TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Húsavørður

Tórshavnar kommuna søkir eftir húsavørði til nøkur av húsum kommununnar.

Húsaumsitingin hjá kommununi umsitur umleið 100 bygningar. Umsøkjarin skal arbeiða undir formanni, og saman við øðrum, røkja umleið 50 bygningar.

**Arbeiðið fevnir m.a. um**
- viðlíkahald av bygningum og økinum uttan um
- at gera umvælingar
- eftirlit við at hita- og sanitetsviðurskifti eru í lagi
- umsjón við reingerðini av bygningunum og at ansa eftir, at reint og ruddiligt er bæði innan og uttan.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava handverkaraútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

Um tú ikki hevur skeið í skipaðum viðlíkahaldi av bygningum, bjóðar kommunan tað.

Neyðugt er at hava koyrikort.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tímalønt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Eivind Danielsen, byggifrøðing, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. november 2001. Viðmerk á umsóknina: "húsavørður".

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Økispedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir økispedagogi.

Dagrøktarskipanin í Tórshavnar kommunu er normerað til 300 børn, og umleið 65 dagrøktarar starvast í skipanini.

**Arbeiðið fevnir m.a. um**
- vegleiðing av dagrøktarmammum
- at skipa fyri ymiskum tiltøkum
- foreldrasamstarv.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Vit ynskja**
at tú hevur roynd innan dagstovnaøkið, arbeiðir sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 16. nov. 2001 ella eftir nærri avtalu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri í 11./13. lønarflokki

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, dagrøktarleiðara, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5.november 2001.

SNARSKIVAN

MBM

# Vit keypa seyðaskinn

Hagreiðing av skinnunum skal verða eftir forskriftum, sum eru í samráð við framleiðaran og góðkend av Landsdjóralæknanum.

Skinnini skulu m. a. kølast beinanvegin eftir at seyðurin er flettur, síðani skal skinnið saltast væl eftir forskriftunum og liggja saltað í minst 14 dagar.
Skinnini skulu saltast í reinum rúmi og liggja soleiðis at hundar og fuglar v. m. ikki kunnu koma at teimum.
Umframt saltaði skinn taka vit eisini ímóti ósaltaðum feskum skinnum.

***Prísirnir eru hesir:***

| | |
|---|---|
| **1. flokks saltað skinn** | **kr. 25,-** |
| **2. flokks saltað skinn** | **kr. 20,-** |
| **Fesk ósaltað skinn** | **kr. 15,-** |

Pesjur verða ikki keyptar.

Seyðaskinnini skulu latast til: **MBM-fóður í Kollafirði á tlf. 421478**

Forskriftirnar um hagreiðing av seyðaskinnum kunnu fáast við at venda sær til **MBM á tlf. 421300**

*Kollafjørður 17/10-2001*

**L/F MBM**

REYNI-SERVICE

# Bilur við skaða

Fyri P/F Trygd selja vit ein Toyota Corolla 1,6 stationvogn.

Bilurin verður seldur fyri hægsta boð sum hann stendur við skaða framman.

Skrásettur 29. mai 2000. Km. 30.000.

**P/F Reyni Service**
**Bilasølan**
tlf. 313040, lokal 20-26

***Uppsetan og skipan av barrum***

*Til:*
*Brúdleyp*
*Rundar føðingardagar*
*Starvsfólkaveitslur*
*Ársveitslur*
*Reseptiónir*
*og tilíkt*



*Hans á Lag Sp/f*
*Tlf. 21 93 83*
*hanslag@post.olivant.fo*

*Sosialurin 311820*

# Starvsfólk til handil í SMS

Søkt verður eftir fólki m/k at arbeiða 3/4 ella 1/2 tíð í skógvahandli okkara.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur staðið í handli áður.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at senda okkum nakrar reglur.

**P/F Demmus**
Boks 1005
110 Tórshavn

# PENSIÓNIR

## Eftirregulering av pensiónum

Almannastovan fer nú at eftirregulera pensiónirnar fyri ár 2000.

Meginreglan er, at pensiónin verður ásett eina ferð um árið, og inntøkugrundarlagið fyri útrokning av pensiónini er skattskyldug inntøka seinasta álíknaða inntøkuár við nøkrum undantøkum.

Í ávísum førum kann pensiónin verða umroknað í árinum. Fyri hesar umrokningar er galdandi – eftir nýggju pensiónslógini, sum kom í gildi ár 2000 – at tær skulu eftirregulerast, tá inntøkan er álíknað eftir inntøkuni viðkomandi ár.

Hetta førir við sær, at allar pensiónir, sum eru broyttar í ár 2000, skulu eftirregulerast við árslok, og inntøkan fyri ár 2000 er álíknað.

Almannastovan fer nú at eftirrokna tær pensiónir, sum eru broyttar í árinum 2000. Vísa hesar eftirrokningar, at ein pensionistur hevur fingið lægri veiting – enn hann hevur rætt til – verður avlopsupphæddin útgoldin.

Hevur ein pensionistur fingið hægri veiting, enn hann hevur rætt til, verður ov nógv útgoldna upphæddin innkravd.

Í tí komandi tíðini kunnu pensionistar, har pensiónin varð umroknað í ár 2000, rokna við at móttaka skriv frá Almannastovuni um eftirreguleringina.



# SKIPASMIÐJAN



Nordhavn Generator Eindir
-við VALMET SISU ella SCANIA motori

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Tel: 31 11 55 · Fax: 31 11 25

P/F Skipasmiðjan á Skála
Tel: 44 11 55 · Fax: 44 11 25

24 tíma Vakt
tlf: 21 11 55

www.faroeyard.fo · E-mail: sale@faroeyard.fo




**kunnu gera munin**
Summardekk · Vetrardekk
Heilársdekk · Píkadekk
Við røttu útgerðini
skifta vit dekkini meðan tú bíðar

DUNLOP



REYNI SERVICE
Vegurin Langi - 188 Hoyvík - Tlf. 313040



# STÓRT JÓLABORÐHALD Á HOTEL ØRAVÍK

*Stórt kalt borð við alskyns flógvum og køldum rættum.*

**Leygarkvøldini 1. & 8. desembur**

*Felagssangur verður við borðhaldið!*

*MOONSHOT úr Vestmanna spæla til dans frá kl. 23:00*

*Kostnaður: Borðhald & dansur kr. 225,-*
*Einans dansur kr. 100,-*

*Borðbílegging á tlf. 37 13 02*



Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg